# Til minnis um mín elskaða beiggja Bjarna Berg

Eg má skriva tað eg kenni, tað er eitt kall. Eg føli meg so ríka, at kunna siga alt tað, sum Bjarni hevur givið mær ígjøgnum lívið, og serstakliga hesa síðstu tíðina.

Eg veit hann var tryggur í trúnni, og hann var ikki bangin fyri at fara haðani; - tað kommunikeraðu vit ofta um.

Eg var so heppin at verða hjá honum, tá ið hann roykti tað seinastu sigarettina, - hann orkaði bara eina hálva. Eg gav honum ta seinastu máltíðina og eg var hjá honum til hansara seinasta andadrátt.

Eg vil citera nakað sum eg læs ta náttina, hann andaðist: "Det er et stort privilegium og en hellig gerning, som vidne og ledsager, at være til stede ved et menneskes død".

Eg havi flutt meg yvir øll mørk hesa síðstu tíðina, og tað var vilji Bjarna´sar. Hann vildi altíð tað besta fyri okkum øll, og gloymdi ofta seg sjálvan.

Ærað verið minni hansara!

Við stórari virðing fyri mínum elskaða beiggja, Bjarna.

**Systur tín, Ann Mari**



**Dagurin**
**13. oktober. Angelus.** Fleiri halgimenni bera hetta navn. Tað er latínskt og merkir eingil, tað er sendiboð.

**14. oktober. Kalixtus**, deyður umleið ár 222. Trælur, sum gjørdist diakonur hjá pávanum og fekk um hendur at standa fyri jarðarferðum. Summar av katakombunum bera navn hansara.

**15. oktober. Heiðveig**, deyð í 1243. Hon var greivadóttir úr Bayern og giftist hertoganum Heinriki 1 í Slesiu. Hon bygdi fleiri sjúkrahús og kleystur. Gav seg sjálv í nunnnukleystur, har hon doyði. Varð skírd halgikvinna í 1267.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra dóttir, systir og unnusta okkara

**Maiken Arge**

andaðist á Odense Sjúkrahús mikudagin 10. oktober, 33 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Hårby Kirkju týsdagin 16. oktober kl.13.00.

*Familjunnar vegna*
**Ruth, Lennart, Crista og Carstin**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæra kona, mamma, vermóðir, gumma, omma og langomma

**Nicolina Thomsen**

andaðist og varð jarðað.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Sandavágs Kirkju.
Tøkk til John Myllhamar og David Johannesen, prest, og tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Joen Jacob, Dánjal, Sigrid og Ása**


## Íbúð í Kollafirði
**uml. 180 m² innrættað soleiðis:**

Stova, køkur, 2 baðirúm, durur, 2 gongir og 4 kømur + stórt óinnrættað loft umframt hjallur, vaskirúm og kjallararúm at deila við leigara í kjallaraíbúð

**Húsaleiguuppskot: Kr. 8.000 pr. mðr + ljós og hita. 2 mðr. depositum**

## Kjallaraíbúð í Kollafirði
**uml. 80 m² innrættað soleiðis:**

Stova, stórur køkur, kamar, gongd, durur og WC við brúsu, umframt hjallur, vaskirúm og kjallararúm at deila við leigara í íbúð í erva.

**Húsaleiguuppskot: kr. 5.000 pr. mðr + ljós og hita. 2 mðr. depositum**

## Bilhús í Kollafirði
**uml. 55 m² við loftið**

**Húsaleiguuppskot: kr. 3.000 pr. mðr + ljós. Ongin hiti er í garaguni. 2 mðr. depositum**

Øll ognin kann eisini leigast í einum leigumáli fyri kr. 14.500 pr. mðr. umframt ljós og hita. 2 mðr. depositum.

**Tlf. 74 99 77 (eftir kl. 16)**
**jandan@post.olivant.fo**


## Kunngerð

Tórshavnar kommuna arbeiðir við nýggjum mannagongdum í samband við umsóknir, býti og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað. Evnið fevnir um grundstykkir, rað- og randarhús eins og íbúðir.

Partur av nýggju mannagongdunum er, at umsóknarlistin verður almannakunngjørdur á heimasíðuni torshavn.fo í næstum.

Umsøkjarar, sum ikki ynskja at standa á almannakunngjørda listanum, verða strikaðir. Tey, ið ynskja at verða strikað av listanum, verða biðin um at boða Snarskivuni hjá Tórshavnar kommunu, Postboks 32 110 Tórshavn Tel. 30 20 10, frá í seinasta lagi tann 26. oktober 2007.

Hevur Tórshavnar kommuna onga fráboðan fingið innan nevndu dagfesting, verður roknað við, at umsøkjarin framvegis ynskir at standa á listanum.

**Tórshavnar kommuna**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum vístu okkum samkenslu í stóru sorg okkara, tá elskaði maður mín og góði pápi, verpápi og abbi okkara

**Absalon Matras Absalonsen**
Viðareiði

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til tykkum á Norðoya Røktarheimi, sum vóru um Absalon, tíðina hann lá har.
Tøkk til Elsu Funding, prest, fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni. Tøkk til sangarar, berarar, kirkjutænarar, gravarar og til tykkum, ið hjálptu til og fyriskipaðu ervið. Tøkk fyri lán av Missiónshúsinum til ervið.
Tøkk fyri vitjanir, heilsanir, uppringingar, bakstur, blómur, kransar og peningagávur til Missiónshúsið.
Hjartaliga tøkk til øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Ani**
**Andrass, Niels Jákup, Atli og Anna**

*Saknurin er stórur.*
*Takk fyri kærleika, umsorgan og ógloymandi minnir.*